ítróttur

Nr. 208 • leygardagur • 28. oktober 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo

Alt sn‡r seg um Klaksvíkina

Anna› vikuskifti á ra› ver›ur oddauppger› í Klaksvík, og hesu fer› er ta› ikki bert kvinnudeildin, sum tosa› ver›ur um

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Ta› gongur vi› fúkandi fer› hjá flogbóltinum í Klaksvík. Bæ›i kvinnur og menn eru vi› frammí í oddinum, og felags fyri bæ›i er, at tey hesu fer› kunnu slíta seg leys frá hinum li›unum.

Botnur og toppur í Klaksvík

Hjá kvinnunum kann hetta gerast longu sunnudagin, tá higartil ósigra›a TB vitjar føroyameistararnar úr Klaksvík.

Higartil hava dystirnir hjá TB ikki veri› teir torførastu, men móti Mjølni sleppur unga li›i› so sanniliga at standa sína roynd, tí klaksvíksgenturnar mugu metast at vera grei›ir favorittar til dystin.

Leygardagin ver›ur eisini dystur á Kambsdali, har ÍF hevur heimavøll. Hesa fer› fáa tær vitjan av Drátti, og einki er at ivast í, at vágagenturnar eru stórfavorittar at vinna dystin.

Sunnudagin ver›ur aftur dystur í Klaksvík, men hesu fer› ver›ur talan um botnupgper›. Hvørki Fossanes ella Fleyr hava fingi› naka› stig, og dysturin sn‡r seg sostatt um, hvørt teirra skal isolerast í botninum.

Enn eitt brak í Klaksvík

Eins og hjá kvinnunum ver›ur oddadystur í Klaksvík hjá monnunum. Her er ta› Fram, sum kemur á vitjan hjá Mjølni, og hendan uppger›in kann gerast sera áhugaverd.

Ja, somiki› jøvn tykjast li›ini at vera, at ta› er ringt at kalla naka› teirra fyri favoritt. Mjølnir eigur tó fyrimunin av heimavølli, men hinvegin eru mátini tey somu, líka miki› hvat í landinum dysturin er, so fyrimunurin er kanska ikki tann stóri.

Undan hesum, altso leygardagin, skulu fuglfir›ingar á heimavølli takast vi› SÍ. Skulu fglfir›ingar aftur fara at nærkast toppinum hetta ári›, er ney›ugt vi› sigri á ungu vágamonnunum. Hetta er so avgjrøt heldur ikki ógjørligt, mett eftir úrslitunum higartil, men SÍ hevur á›ur s‡nt, hvussu misjøvn avrik teirra kunnu vera, so ta› kann meira enn so henda seg, at teir gera ein vørr leygardagin.

Stjørnan skal standa sína roynd

Føroyameistararnir úr Klaksvík skulu anna› vikuskifti› á ra› til Havnar, og aftur tykist talan at gerast um ein spennandi dyst

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Sjey dystir eru á skránni hetta vikuskifti›, og einki er at ivast í, at fleiri teirra kunnu gerast heilt áhugaverdir. Ikki minst, tá oddali›ini hjá bæ›i kvinnum og monnum skulu í eldin.

Aftur til Havnar

Hjá kvinnunum var› ein dystur spældur fríggjakvøldi›, eftir evstamark okkara. Talan var um Sóljuna, sum spælir sínar mi›vikudystir fríggjadag, og hesa fer› gekk lei›in so til Havnar, har dystur var ímóti Kyndli.

Á pappírinum ein uppgáva, sum Kyndil skal loysa, um tær skulu gera sær vónir um eina endastø›u í toppinum.

Hondbóltur ver›ur uppi á Hálsi tríggjar dagar á ra›. Í dag skulu Neistin og Tjaldur takast, og mett eftir avrikunum seinast hja li›unum, er einki at ivast í, at Neistin her skal toga ein tryggan sigur heim.

Sunnudagin stendur so Kyndil aftur fyri skotum. Gestirnir eru verandi føroyameistararnir úr Stjørnuni, sum anna› vikuskifti› á ra› skulu til høvu›sta›in. Seinast eydna›ist ta› teimum akkurát at vinna ein tepran sigur á Neistanum, og ivaleyst eru tær fegnar, um hetta eisini eydnast sunnudagin. Uppgávan hesa fer› tykist tó torførari, tí í øllum førum átta mál frá seinastas dysti resta í. Talan er sjálvandi um missin av Adrianu Milodanovic, sum sleyt hælsinuna móti Neistanum. »Breiddin í hópinum skal nú standa sína roynd« seg›i venjarin hjá Stjørnuni eftir bo›ini um jugoslavan, og ta› sleppur hon so eisini sunnudagin.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum um vikuskifti› ver›ur í Vági, har VB og Sóljan fara á vøllin. VB hevur aftur í ár ætlanir um at blanda seg í oddastrí›i›, og skal hetta eydnast betri enn í fjør, er ney›ugt vi› einum sigri á vágagentunum. Hvørt hetta so eydnast fæst at vita sunnukvøldi›.

Hvør fer í ovara bólkin

Eins og hjá kvinnunum, ver›a dystir uppi á Hálsi í Havn bæ›i leygar- opg sunnudagin.

Leygardagin skal Neistin reisa seg eftir tvey tap á ra›, og møguleikarnir fyri sigri á Tjaldrinum áttu at veri› gó›ir. Sagt á ein annan hátt, so er tvingandi ney›ugt hjá Neistanum at vinna, um teir á nakran hátt skulu halda fast í hinum li›unum.

Sunnudagin ver›ur ta› so Kyndil, sum skal royna seg, og eisini hjá teimum tykist dysturin at hava alstóran t‡dning.

Byrjanin hjá teimum grønu hevur als ikki veri› gó›, og nú vitjar StÍF, sum í løtuni er á ø›rum plássinum. Ein sigur vil fyri Kyndil vi› føra, at teir rættiliga eru vi› aftur í kappingin um silvuri›, me›an eitt tap hinvegin merkir, at strandingar í fyrstu atløgu kunnu slíta seg leysar saman vi› vestmenningum, sum halda fri hetta vikuskifti›.

Er spenningur í Havn sunnudagin, er hann ta› ikki minni í Vestmanna, har H71 vitjar hjá KÍF. Bæ›i li›ini hava í ár víst, at tey væl kunnu vísa tenn móti sonevndu favorittunum. Tí tykist ta›, sum um dysturin sunnudagin ver›ur ein dystur um, hvat av li›unum skal bíta seg fast í subtoppin, og hvat teirra fyri fyrst ver›ur parkera› í ongamannalandi.

Óli skal hjálpa Toda

Sunnudagin heilsast Jákup og Todi aftur. Hesu fer› eru leiklutirnir tó b‡ttir um, tí nú er ta› FRCK, sum jagstrar gullmerkini

Skulu Todi Jónsson og FCK upp á ovastu rók í superliguni longu sunnudagin, ver›ur ney›ugt vi › hjálp frá Óla Johannesen

SUPERLIGA
Jákup Mørk

Anna› vikuskifti› á ra› ver›ur talan um føroyingauppger› í Danmark. Hesu fer› ver›ur hendan í Parkini, har Herfølge kemur á vitjan hjá FCK.

Dystirnir millum hesi bæ›i li›ini hava mangan veri› javnir, men at meta eftir stigatalvuni er ikki nógv, sum Jákup og teir kunnu gera hesfer›. FCK er sera væl fyri í løtuni, og fingu, hóast sn‡ttir av dómaranum, eitt stig vi› sær heimaftur, tá teir mánakvøldi› vóru á vitjan hjá FC Midtjylland.

Javnleikurin tá merkti, at Brøndby smoygdi sær fram á fyrsta plássi›, og skal FCK fram um teir, krevst ein sigur, umframt at Brøndby missur.

Ta› kunnu teir gera í Aarhus, har Óli Johannesen møguliga ver›ur millum teirra, sum skulu royna at ste›ga oddali›inum. Farna vikuskifti koppa›i AGF Lyngby, og tá spældi Óli vi› seinastu løtuna, sum samstundis var avgerandi parturin av dystinum.

Einki er at ivast í, at Todi setir sína vón til, at Óli og teir hava ein gó›an dag, me›an hann hesu fer› ikki man leggja so nógv í, um Jákup ger okkurt kiks í Herfølge málinum.

Fjór›i føroyingurin í superliguni, Johan Byrial Hansen, var ikki á vøllinum, tá OB spældi javnleik í Herfølge. Hesu fer› ver›ur ta› móti Viborg, at OB skal royna seg, men ikki er vist, hvørt rúmd ver›ur fyri Johan, ella um venjarin framhaldandi fer at n‡ta hann í beinkinum.

Í Sogndal síggja teir ljóst upp á ta›

Hóast teir ikki vunnu á heimavølli, so halda teir í føroyska felagnum í Noreg seg hava eins gó›an møguleika mánadagin, sum mótstø›uli›i› hevur

Ta› er framvegis møguleiki fyri, at tveir føroyskir landsli›spælarar komandi ár fara at spæla í norsku deildini. Avger›in fellur mánadagin, tá Sogndal fer at spæla á norska tjó›vøllinum, Ullevaal. Vit søgdu fyrr í vikuni, at dysturin var ásettur at vera komandi mikudag, og at teir í Sogndal høvdu mótmælt hesum, tí fleiri av teirra spælarum í komandi viku skulu vi› U–18 landsli›num út at fer›ast.

Mikudagin gjørdi norska fótbóltssambandi› av at taka mótmæli› hjá Sogndal til eftirtektar. Teir framskunda›u dystin í Oslo til at vera mánadagin. Eftir at dysturin í Sogndal var li›ugur mikudagin var venjarin hjá Vålerengen ikki sørt rísin. Hann kundi hugsa sær, at li›i› hjá honum hev›i dagarnar fram til komandi mikudag at koma fyri seg aftur eftir stóra strí›i› í Sogndal. Og venjarin helt ta› vera nógv fyri, at fótbóltssambandi› hev›i lurta› eftir kæruni hjá Sogndal. Venjarin vísti á, at í dystinum mikudagin var ta› bara ein U–18 landsli›sma›ur, sum var á li›num hjá Sogndal, og hann var bara á vøllinum í níggju minuttir.

Kurt gull verdur

Um ta› fer at eydnast hjá Sogndal at flyta upp í bestu deildina, so fara føroysku spælararnar at hava sín part í æøruni fyri ta›. Í norsku fjølmi›lunum gera teir serliga burturúr Kurt Mørkøre, sum aftur mikudagin gjørdi um seg. Sjey minuttir vóru farnir, tá Julian Johnsson, sum var á mi›vøllinum alla tí›ina, eftir innkast sendi bóltin innfyri máli›. Kurt Mørkøre var á rætta sta›num, og úr málteiginum smekka›i hann bóltin í kassan.

Norskir fjølmi›lar undrast yvir máltevi› hjá Kurt Mørkøre. Teir vita at siga, at higartil hevur Kurt spælt 45 dystir fyri Sogndal, og at hann hevur skora› 38 mál. Ta› ver›ur mett at vera eitt einastandandi avrik. Og so vita fjølmi›larnir at siga, at tá Kurt kom til Sogndal fyri einum gó›um ári sí›ani, viga›i hann 102 kilo, og at hann nú vigar 86 kilo.

Fyri Sogndal ver›ur ta› mett at vera dyggur smeitur, at Kurt Mørkøre, sum var› útskiftur, tá ta› resta›i ein lítil løta, ikki ver›ur á li›num mánadagin. Longu um mi›jan 1. hálvleik fekk Kurt Mørkøre gult kort fyri eina eitt sindur ófantaliga takling, og ta› hevur vi› sær, at hann er leikbanna›ur mánadagin.

Julian strí›ist

Í 1. hálvleiki var nógv fer› á mikudagin, og í 2. hálvleiki var fer›in sett uppaftur longri upp. Ta› hev›i vi› sær, at sendingarnar ikki altí› vóru so neyvar.

Á mi›vøllinum hjá Sogndal hev›i Julian Johnsson ey›s‡ndan leiklut allar 90 minuttirnar. Hann spældi ímóti fyrrverandi landsli›smanninum Kjetil Rekdal, sum er ein av álitismonnunum hjá Vålerengen.

Vålerengen javna›i til 1–1, tá átjan minuttir vóru eftir. Máli› kom eftir eitt skjótt mótálop, har málverjin hálvbjarga›i í fyrsta umfari.

Sogndal tr‡sti nógv sí›stu løtuna fyri at fáa sigursmáli›. Teir høvdu tríggjar og vi›hvørt f‡ra spælarar í álopinum, og ta› vóru fleiri spentar stø›ur frammanfyri málinum. Julian Johnsson hev›i eina skotroynd úr málteiginum, men tíverri blokera›i verjan bóltin.

Í Vålerengen frøddust teir um javnleikin á útivølli. Teir meta hetta sum eitt gott úrslit, og teir rokna avgjørt vi› møguleikanum at vinna samanlagt. Í Sogndal halda teir ikki, at mótstø›an var so ógvuslig, at teir ikki hava nakran møguleika at vinna. Venjarin heldur, at um allir spælararnir leggja alla orku í, so hava teir eins stóran møguleika, sum teir í Vålerengen hava.

Ta› vóru 3.387 ásko›arar í Sogndal. Ta› ver›ur rokna› vi›, at ásko›aratali› fer at ver›a væl hægri í Oslo. Einki er at ivast í, at Julian Johnsson og li›felagarnar væl og vir›iliga fara at ver›a mintir á, at teir fara at spæla á útivølli.

jh

Grikkaland er marran hjá Jákupi

Hóast hann enn eina fer› var besti ma›ur hjá Herfølge, so noyddist Jákup Mikkelsen fyri a›ru fer› at fara úr Grikkalandi vi› 5–0 tapi í vi›førinum

Herfølge skal hóskvøldi› í a›ru viku spæla UEFA Cup dyst á heimavølli ímóti AEK Athen. Eftir 5–0 tapi› á útivølli hóskvøldi› er ta› greitt, at dysturin í a›ru viku ver›ur tann sí›sti hjá Herfølge í UEFA Cup á hesum sinni.

At tapa 5–0 í Grikkalandi hevur Jákup Mikkelsen roynt eina fer› á›ur. Merkisvert er ta›, at bæ›i hesa fer› og fyrru fer›ina, hann var har ni›ri og spældi, var stø›an eftir fyrra umfari› málleysur javnleikur.

At ta› hóskvøldi› framvegis stó› á jøvnum, eftir at teir fyrstu 45 minuttirnir vóru farnir, var bara einum manni fyri at takka, nevnliga málverjanum hjá Herfølge, Jákupi Mikkelsen, sum vardi máli› so sannførandi, sum hann hevur gjørt í superliguni tær seinastu vikurnar.

Herfølge hev›i eina so varna útgangsstø›u, sum ta› sjáldan er at síggja í altjó›a fótbólti. Í 1. hálvleiki lógu li›felagarnir hjá Jákupi í og kring brotsteigin, og ta› var rárasta hending, at fleiri enn ein og tveir komu framum mi›strikuna. Málmøguleikar høvdu teir so at siga ikki.

Skora›i f‡ra fer›ir

Bara tveir minuttir eftir ste›gin kom hol á, og so gekk ta› skjótt hjá heimali›num. Dennis Nikolaidis fekk ein bólt í d‡pdina og sendi framvi› Jákupi, sum onga hjálp fekk frá verjuni. Bara tríggjar minuttir seinni var stø›an 2–0. Málskjúttin var tann sami. Hesa fer› stúta›i hann innlegg í kassan.

Nikolaidis gjørdist stóri spælarin hjá AEK, sum fyrr í summar vann grikssku steypafinaluna. Í 62. minutti økti hann til 4–0, og í 75. minutti sta›festi hann 5–0 sigurin. Tri›ja máli› skora›i Zikos í 59. minutti.

Tá tvey tey fyrstu málini vóru komin, royndi Herfølge at flyta verjuna eitt sindur longri fram, men ta› nytta›i líti›. Belgiski linjudómarin hev›i ilt vi› at fylgja vi›, og tískil kiksa›i ta› onkra fer›ina vi› rangstø›uni.

Fyrra fer›in

Sum omanfyri nevnt, so hevur Jákup Mikkelsen ikki serliga gó› hagtøl at minnast aftur á, tá hann hevur spælt í Grikkalandi. Frammanundan fer›ini til Athen í hesi vikuni, hev›i Jákup Mikkelsen eina fer› á›ur spælt í Grikkalandi. Ta› var í november í 1995, tá landsli›i› spældi EM undankappingardyst á Kreta, og Allan Simonsen fyri fyrstu fer› í undankappingardysti valdi Jákup Mikkelsen framum Jens Martin Knudsen.

Ta fer›ina var ta› málleyst eftir teir fyrstu 45 minuttirnar. Í 2. hálvleiki tr‡stu grikkar eitt sindur meiri á turboina, me›an orkan gekk undan hjá føroyingunum, sum sjálvandi ikki vóru í serliga gó›ari dystarvenjing so seint á árinum. Ta› gekk ein lítil tími, inntil hol kom á, men so gekk skjótt. Grikkaland vann 5–0.

Herfølge skal spæla á heimavølli í UEFA Cup anna› hóskvøld. John Faxe Jensen, sum hesa fer› hev›i sett seg sjálvan á mi›vøllin hjá Herfølge í einari roynd at fáa altjó›a tyngd í, ásanna›i eftir dystin, at teir høvdu spælt ímóti einum fínum fótbóltsli›i, sum var manna› vi› spælarum vi› framúr gó›um bóltførleika. Venjarin sta›festi, at nú er ta› landskappingin, sum er fremst í huganum á teimum í Herfølge. Í morgin skal Herfølge spæla á útivølli í Parkini í Keypmannahavn ímóti FCK og Toda Jónsson.

jh